




# 628 NÆMINGAR Í 1. FLOKK Í DAG

**628 byrjaðu í 1. flokki í dag. Talið er nærum 100 næmingar færri samanborið við í fjør, tá ið 725 næmingar fóru í 1. flokk**




**Rólant Waag Dam**

Tølini hevur heimasíðan á Føroya Lærarafelag lagt á heimasíðu sína um vikuskiftið.

Í fyrraári fóru 754 næmingar í 1. flokk og árið fyri 684. Sostatt er talið á næmingum, sum fara í skúla í ár, tað lægsta í nógv ár.

Ikki færri enn 297 næmingar fara í 1. flokk í skúlunum í Tórshavnar kommunu, samanborið við 306 í fjør og 274 í fyrraári. Í 22 skúlum byrja færri enn 10 næmingar í 1. flokki. Í Fámjins skúla, Haraldssunds skúla, Hovs skúla, Húsar-Syðradals skúla og Oyndarfjarðar skúla byrja bert ein næmingur í 1. flokki.

Tilsamans 6865 næmingar ganga í fólkaskúlanum komandi skúlaár. Síðsta skúlaár var talið 6920 og árið fyri 7061. Í hesum tølum eru næmingar í frískúlanum við Hoyvíkstjørn, í Havn og í Kelduni í Skálabotni, ikki íroknaðir, boðar Føroya Lærarafelag frá.

*rolant@sosialurin.fo*

## *Øssur Gudmundarsson*

Býarmynd og HB-ari.

**Týsdagin 17. august fyllir ein væl kendur havnarmaður 45 ár**

Talan er um Øssur Gudmundarsson sum kanska er best kendur sum ein íðin HB- viðhaldsmaður.

Øssur er við til flest allar dystir hjá HB og ofta við og hjálpir til í hópinum, umframt at hann er fastur røðari til ársveitslurnar hjá felagnum.

Hann er eisini fastur fúsur til kappróður og heldur hann við bláu bátunum hjá Knørrafelagnum.

Honum dámar eisini væl at sita á hestbaki.

Øssur arbeiðir á Verkstaðnum Vón á Argjum, har hann hevur verið á timburdeildini og fyri tíðina arbeiðir hann í køkinum og býr á sambýlinum á Mýruni í Hoyvík.

Øssur er fyrikomandi og altíð í góðum lag og hugaligur at koma í prát við.

Hann minnist eisini væl til, tá onnur hava merkisdagar og sendir teimum heilsanir í útvarpi og bløðum. Vit ynskja honum eisini tillukku, nú hann hevur ein serligan dag.

## Í MORGIN




Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

## MIKUDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin upp í ein strúk. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.

## HÓSDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av eystri og regn. Leygardagin snarar hann í útsynning og ælingur, Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. vestan fyri Ísland fer í landsynning og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið við Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

10. august — Tendring/mánin næstur jørðini
16. august — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. aug. | 00:00 | 12:40 | 11:40 | - | 11:55 | - | 02:00 | 14:40 | 03:00 | 15:40 | 10:55 | 23:35 | 09:55 | 22:35 | 00:15 | 12:55 | 01:15 | 13:55 | - | 12:25 | 01:00 | 13:40 |
| 17. aug. | 01:20 | 14:00 | 00:20 | 13:00 | 00:35 | 13:15 | 03:20 | 16:00 | 04:20 | 17:00 | - | 12:15 | 11:15 | 23:56 | 01:35 | 14:15 | 02:35 | 15:15 | 01:05 | 13:45 | 02:20 | 15:00 |
| 18. aug. | 02:41 | 15:07 | 01:41 | 14:07 | 01:56 | 14:22 | 04:41 | 17:07 | 05:41 | 18:07 | 00:56 | 13:22 | - | 12:22 | 02:56 | 15:22 | 03:56 | 16:22 | 02:26 | 14:52 | 03:41 | 16:07 |
| 19. aug. | 03:33 | 15:58 | 02:33 | 14:58 | 02:48 | 15:13 | 05:33 | 17:58 | 06:33 | 18:58 | 01:48 | 14:13 | 00:48 | 13:13 | 03:48 | 16:13 | 04:48 | 17:13 | 03:18 | 15:43 | 04:33 | 16:58 |
| 20. aug. | 04:23 | 16:47 | 03:23 | 15:47 | 03:38 | 16:02 | 06:23 | 18:47 | 07:23 | 19:47 | 02:38 | 15:02 | 01:38 | 14:02 | 04:38 | 17:02 | 05:38 | 18:02 | 04:08 | 16:32 | 05:23 | 17:47 |